# SOSIALURIN er har tað hendir

HALD SOSIALIN WWW.SOSIALURIN.FO

2000 -ver við frá byrjan!

**Tíðindablaðið**
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

**ÓKEYPIS**
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur
Tlf.:
Undirskrift:

- ☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
- ☐ Internet: 240,-/ársfj.

## Yamaha Waveraider vatnskutari til sølu




1100 cc motor, QSTS system 110 HK top fart 120 km sær sera gott út. Hevur bert siglt í 60 tímar.

Ikki fyri persónar ið veikum hjarta. Bert til keyparar, ið meina tað í álvara.

**Tlf. 37 21 10 • Mobil 21 52 10**

## Turbo Trans-AM til sølu



Av serligum orsøkum og um hóskandi boð fæst, er ein Turbo Trans-Am, modell 1981 av gamla skrokkinum (seinasta modell), til sølu. V8, 301, 4,9 litrar, hevur bert koyrt 64 túsund í alt. T-toppur við øllum. Bilurin hevur tað upprunaliga lakkið (Trans-Am reyður) og er 100% rustleysur, tó er neyðugt at sproyta hann so at hann skal verða fullkomin. Hann hevur havt sama eigara í meira enn 16 ár. Eitt fyrsta floks eintak.

Eigarin, ið vil hava alt fullkomið, hevur endurnýggjað allan motorbúnaðin í bilinum fyri uml. 1.500 túsund ísl. kr. (ca. 150.000 d.kr.) Millum annað er alt nýtt innan í og uttan á motorinum, leiðir og ringar (standard stødd frá GM). Nýggj oljupumpa, bensinpumpa, vatnpumpa, nýggjur knastaksil, undirliggjandi. Alt er nýtt uttan á motorinum til dømis: Nýggjur alternator, nýggjur elektroniskt stýrdur karburator, nýggj telda, ið stýrir karburatorinum, tendringini og automatiskum gearum. Nýggj tendring og tendringskervi, nýggj avgassturbina og dupult útstoytsrør úr rustfríum stáli. Automatiskur gearkassi við automatiskum fjóðra gear (Lock-up). Allur bremsubúnaður er nýggjur frá GM, nýggj dekk frá BF Goodrich, radioal TA framman 245/60 R 15, og 255/60 R 15 aftan. Upprunaligar Turbo Trans-Am felgur av aluminium. Upprunalig svørt innrætting, sær út sum nýggjur innan. Í bilinum er upprunaligur stýribúnaður, ið er sum nýggjur, men nýggjur stýribúnaður frá GM fylgir við og somuleiðis aluminiumsgardinur til afturrútin. Alt arbeiðið er gjørt av einum fakmanni á viðurkendum verkstað. Akfarið hevur altíð verið 100% til sýn. Alt tilfar um bilin er hjá Bileftirliti Íslands. Har kann ein fáa sjón fyri søgn!

Um tú kundi hugsa tær at ogna tær henda sjáldsama dýrgrip, ert tú vælkomin at geva eitt tilboð til:

Jón Sigurðsson
Faxabraut 39, A
230 Keflavík
IS-Ísland
Fax +354 421 2339

Eisini ber til at ringja á tlf. +354 861 3080 (GSM) og fá meiri at vita um bilin annaðhvørt á íslendskum ella enskum máli.

## Eysturoyar Bilstjórafelag

Stovnandi aðalfundur fyri lastbilaeigarar í øllum landinum verður í Ólastovu í Saltangará leygardagin 5. feb. 2000 kl. 15.

**Nevndin**

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

## Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar skúlaárið 2000/2001

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1994 í 1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum, Hoyvíkar skúla ella Kaldbaks skúla næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 24. ella 25. januar 2000.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 24. og týsdagin 25. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**

Skúlaráðið skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísar skúlar í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúlar, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 317160

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Skúlaráðið fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Argja skúli og Hoyvíkar skúli**
Næmingarnir á Argjum fara í skúla kl. 11.40, men kunnu fara í Frítíðarskúlan fyrrapart. Í Hoyvíkar skúla fara tveir flokkar í skúla fyrrapart. Flokkurin við næmingum, sum búgva Millum Gilja, fer í skúla kl. 11.50, men teir kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, verða **ikki** innskrivað í býráðssalinum, men umsóknarbløð til Frítíðarskúlan fáast í býráðssalinum, heimasíðu komununnar (www.torshavn.fo), á býráðsskrivstovuni ella á tlf. 315160.

**Meir fæst at vita**
Meir fæst at vita um innskrivingina í skúlunum ella hjá Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, skrivara, tlf. 315160.

WWW.TORSHAVN.FO

Tórshavnar skúlaráð



*Lýsið í* **sosialinum**



## Gravsteinar og kantsteinar. Nú eisini úr føroyskum gróti

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

# LEIÐARASKEIÐ

## Leiðslumenning og læra at loysa trupulleikar (II)

### Frá trupulleika til munadygga avgerð

**Endamál**
At tú sum leiðari lærir at seta mál, skipa, stýra og menna eini avgerðarmannagongd hjá einum bólki, soleiðis, at innlitið og royndirnar hjá øllum koma til gagns, og at ein munadygg avgerð verður tikin.

**Stevnumið**
Eftir lokið skeið hevur tú fingið royndir og førleika í:

- at leggja arbeiði í einum bólki til rættis á ein hátt, ið tryggjar, at málið verður rokkið
- at skapa arbeiðsumstøður, ið tryggja at uppgávur verða loystar á besta hátt
- at útnytta tilfengi hjá hvørjum einstøkum luttakara til fulnar
- at hava umsjón við arbeiðinum í einum bólki soleiðis, at menning er í avgerðargongdini

**Arbeiðsháttur**
Arbeiðshátturin gevur luttakarunum møguleika fyri

- at royna seg við ymsum framferðarhættum
- at viðgera upplivingar og at læra av tí.

Innanhýsis sjónvarp verður nýtt.

**Innihald**
Á skeiðinum fært tú venjingar í og vitan um:

- at taka dygdargóðar og samtykkiligar avgerðir
- at leiða út frá eini givnari støðu
- at leiða arbeiði við trupulleikaviðgerð við at brúka
  - trupulleikagreining
  - arbeiðshættir
  - stýring
  - mannagongd
  - og greining av arbeiðsgongd í bólki

***Tíð***
*Hósdagin 24. februar 2000 kl. 09.00 til leygardagin 26. februar 2000 kl.16.30*

***Staður***
*Hotel Eiði. Skeiðið er eitt internatskeið*

***Skeiðleiðarar***
*Peter Gram frá LMB og Gloria Kalsø frá LMB*

***Prísur***
*Kr. 6.500,00 fyri hvønn, íroknað mat og gisting.*

***Tilmeldingarfreist***
*10. februar 2000*

*Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum.*
*Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:*

**LEIÐSLUMENNINGARBÓLKURIN**
**SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS**
STH*LMB

Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374

*LMB (Leiðslumenningarbólkurin) er ein arbeiðsbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin várið 2000 fevnir um hesi skeið: Grundskeið í leiðslu - Leiðslumenning og læra at loysa trupulleikar - Leiðsluframferð.*

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

sosialurin
www.sosialurin.fo

# AAAAHH..... ASSU




**Restorffs**
**BRYGGJARÍ**
**Tel. 314720**

Sosialurin - 311820

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

**Suðuroyingar!**

*Nýtt skeið*

Lastbil
Trailara
Buss

**á Drelnesi**
mánakvøldið 7. feb. kl. 20.00
*(um nóg nógv tekna seg)*

SP/F **Koyrikortið**
Tórshavnar Trafikkskúli
*Stoffalág 82*
Tel 318821 • 315298 • Fartel. 288777

## Bilur við skaða til sølu

**Toyota Carina E 1,8 GLi sedan árg. juli 1995 við skaða verður seldur fyri hægsta boð. Bilurin stendur í Klaksvík.**

**P/f Reyni Service**
**188 Hoyvík**
**Tel. 313040**
**Att.: Bilsølan**

**REYNI SERVICE**

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820